# TÍÐINDI

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# 0-hugsjón við klippikorti


*Jákup Jacobsen, stjóri á Akstovuni. Talan verður ikki um fysiskt at klippa í koyrikortið, men symbolikkurin er eyðsýndur*

**Frá 1. Januar 2008 verður nýggj skipan sett í verk, sonevnda klippikort skipanin. Hetta er eitt hent amboð í stríðnum móti endurtøkusyndarum í ferðsluni, eins og tað stuðlar undir 0-hugsjónina**

FERÐSLUTRYGD
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Á tíðindafundi í morgun varð løgd fram nýggja ferðslulógin, sum inniheldur sonevndu klippikortskipanina.

Hetta er ein skipan, ið serliga vendir sær ímóti bilførarum, sum ferð eftir ferð fremja álvarssom brot á ferðslulógina. Eisini styðjar skipanin undir 0-hugsjónina, tí hon víðkar revsiskipanina, og gevur løgregluni eitt kort á hondina aftrat. Talan verður sostatt ikki um at nøkur revsing fellur burtur, men hinvegin kemur meiri aftrat.

Tað nýggja í skipanini er, at nú verður hvørt ferðslubrotið skásett hjá løgregluni, og tá ein bilførari hevur fingið tríggjar skrásetingar – ella klipp, sum tað verður nevnt – innan fyri trý ár, verður hann frádømdur koyrikortið treytað.

Er talan um nýggjar bilførarar, verða bert tvey klipp givin, áðrenn tað gevur treytaða frádøming av koyrikortinum.

Sett er inn í lógna ein rúgva av ferðslubrotum, sum framman undan bert góvu bøtur, men sum nú eisini geva klipp í kortið. Hetta er alt ætlað fyri at fólk skulu hugsa seg serliga væl um, tá tey hava fingið eitt ella tvey klipp, tí tá vita tey, at eitt klipp aftrat kostar treytaða frádøming av koyrikortinum.

Somu skipanir hava verið nýttar í londunum uttan um okkum í eitt áramál, og har hava tey havt góðar royndir, so hetta gevur eisini Akstovuni, fútaqnum og løgregluni vónir um, at skipanin eisini her heima hjá okkum fer at verða til stóran bata í ferðsluni.

## Steinbjørn, ikki Tummas

Í blaðnum í gjár stóð grein um Menningardeildina hjá SamVit, og har pástóð blaðmaðurin, at tað var Tummas í Dali, sum arbeiddi við íverksetarum har. Hetta er sjálvandi ikki rætt. Eftirnavnið passar, men maðurin, sum hjálpir og stuðlar undir íverksetarar, er sjálvandi Steinbjørn í Dali. Umberingar kundu verið førdar fram um trongt evstamark og tíðartrýst, men sannleikin er jú, at tað finst eingin umbering fyri slíkt tankaloysi. Vónandi vilja bæði Tummas og Steinbjørn í Dali bera yvir við blaðmanninum og hansara dølskni í hesum máli.

**(leo)**




# Hólmgonga um politikk og átrúnað í Miðlahúsinum

**Í sambandi við nýggja essay-savnið „Krossvegir" verður kjaktiltak um kristindómsins leiklut í føroyskum politikki í Miðlahúsinum hóskvøldið kl. 20. Fýra kjakarar mannað panelið, og undir tiltakinum fer Hanus G. Johansen at syngja og spæla**

MIÐLAHÚSIÐ
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Hvønn leiklut skal kristindómurin hava í føroyskum politikki?

Hesin spurningurin verður snúningsdepilin undir kjaktiltaki í Miðlahúsinum hóskvøldið kl. 20, tá Kristianna Winther Poulsen, Sjúrður Skaale, Rúni Rasmussen og Bill Justinussen fara at kjakast um hendan spurning. Undir tiltakinum fer Hanus G. Johansen at spæla og syngja.

Tiltakið verður hildið í sambandi við nýggja essay-savnið „Krossvegir", sum kom út fyri nøkrum vikum síðani, har fimtan føroyskir høvundar skriva um viðurskiftini millum átrúnað og politikk í Føroyum, og sum Páll Holm Johannesen og Heini í Skorini hava ritstjórnað.

Trý av teimum fýra, sum mannað panelið hóskvøldið, hava eisini skrivað hvør sítt kapittul í essay-savninum. Tey eru Kristianna Winther Poulsen, Sjúrður Skaale og Rúni Rasmussen. Kristianna er cand.mag. og var partur av tí bindiklubbanum, sum tók stig til at savna saman undirskriftir fyri at broyta § 266b til eisini at fevna um kynsliga orientering. Rúni Rasmussen er stjórnmálafrøðingur og fyrrverandi skrivari í Stjórnarskipanarnevndini, og Sjúrður Skaale ereisini stjórnmálafrøðingur og valevni fyri Tjóðveldi. Fjórði luttakarin í panelinum er Bill Justinussen, sum situr á tingi fyri Miðflokkin.